# Fyrr var ólavsøkan nógv villari



**Í dag er alt so reint og keðiligt, og fyrr var alt so skitið og stuttligt, heldur Rasmus Rasmussen í Havn, sum hevur eygleitt, hvussu ólavsøkan er broytt. Tó fegnast hann um, at gott skil er komið á ólavsøkuna, og at rovini av seyðarhøvdum ikki longur sløðast runt um allan býin**

**Uni Arge**

Á Tinghúsvøllinum stendur Rasmus Effersøe, og kring Tinghúsvøllin kanst tú meira enn so síggja ein annan Rasmus, tann Rasmus, sum klippir myndir av urtagøðrum, húsum og landsløgum í Føroyum.

Rasmus Rasmussen er eins og Rasmus Effersøe ein býarmynd í Havn, og tann inkarneraði havnarmaðurin við tí kviku replikkini hevur upplivað manga ólavsøkuna, síðan hann varð føddur 22. apríl í 1944.

Meðan Rasmus Effersøe stendur og starir oman á Gamla Apotek, seta vit fyri ólavsøku Rasmusi Klipp stevnu mitt í býnum og biðja hann greiða frá, hvussu ólavsøkan var fyrr, og um hon er broytt.

Beinanvegin fer hann at tosa um nonnurnar og sigur, at alt, sum verður boðið børnunum á ólavsøku nú á døgum, er so lættisoppakent. Øðrvísi kramm var í basarinum og fiskidamminum hjá nonnunum í 50'unum.

– Tær seymaðu sjálvar dukkur og gjørdu stórar slikkipinnar, sum vit kundu vinna. Eisini kundu vit vinna leikutoy, sum fólk høvdu latið teimum til basarin. Tað var øgiliga spennandi at vitja hjá nonnunum á ólavsøku, minnist Rasmus.

Ein vinmaður hansara hevði einaferð so andbráður latið basarinum hjá nonnunum ein lítlan brandbil, men tá ólavsøkan kom, angraði stakkalin so nógv, at hann hevði givið brandbilin burtur, at hann møtti upp sum tann fyrsti til basarin.

Komin fram at fiskidamminum gav hann eini nonnu 10 oyru fyri at sleppa at fiska, krøkti í brandbilin og syfti hann út um diskin. Soleiðis fekk vinmaðurin kortini eina góða ólavsøku.

## 40 fyltir lundar

Ólavsøkan var í mangar mátar ein stórhending í 50'unum, minnist Rasmus. Hetta var einasta tíðin á árinum, at børnini kundu keypa reyðar pylsur, og av bygd komu nógv fólk til Havnar við mjólkarbátinum.

– Fólk komu til Havnar at vera hjá vinfólki og familju í fleiri dagar, og her keyptu tey sovorðið sum líggjar, rívur og spakar. Tey komu at halda ólavsøku, men gjørdu eisini fleiri ørindir í Havn, sigur Rasmus.

Í dag verður ofta dekkað fínt upp, tá gestir av bygd koma á gátt á ólavsøku, men Rasmus minnist eina ólavsøku, tá mamma hansara, Rigmor, beyð gestum innar til eina rættiliga øðrvísi máltíð.

– Hon fylti 40 lundar og legði teir í eina stóra grýtu í køkinum. So kundu fólk bara fáa sær. Ein danskari, Svend Bøgeskov, kom so inn, og hon rópti á hann: »Er du sulten, Bøgeskov, so snup en papegøje!«

## Snaps og Elephant

Nógv varð eisini drukkið á ólavsøku, og tá í tíðini sótu fólk ikki bara og nippaðu til eina øl, sum tey gera nú. Drukkið varð, til fløskan var tóm, og helst skuldi løgurin vera sterkur.

– Fólk høvdu eina hálva Akvavitt í reyvalummanum og drukku Elephant, FF-arar og Gull. Drakst tú eina hálva fløsku av snapsi og fimm Elephantar, so vart tú skít, minnist Rasmus.

Brennivínið varð bílagd úr Danmark, og ratiónin var 12 fløskur hvønn ársfjórðing, um tú annars hevði goldið skatt. Ølið kom við Skipafelagnum í trækassum. 50 fløskur vóru í hvørjum kassa, so teir vóru tungir sum fjøll.

– Ólavsøkan var sjálvandi hátíðarlig, sum hon er nú, men hon var eisini ein suppa av glassplintrum, fullum fólkum og religión. Hon var nógv villari fyrr, heldur Rasmus.

## Prædikantur bakkaði

Hann minnist, at ein kendur havnarmaður einaferð fór upp til ein prædikant í mið-